# Hósdagur 21. februar

**svf**

- 15.00 OL-samandráttur
- 18.25 DV í kvøld
- 18.30 Pocahontas 2:26
- 19.00 Oggy og kakulakkarnir - teknifilmur
- 19.15 Røddir úr Norðurlondum (e)
- 20.00 Dagur og Vika
- 20.20 Kjak
- 20.45 Lívið umborð 1:4 - donsk stuttrøð
- 21.15 Airport - úr Heathrow floghavn
- 21.40 Krimitímin: Undir illgruna II 3:4 - virðislønt ensk krimirøð
- 22.35 Vald andanna II
- 23.15 Vald andanna - eyka
- 23.25 Liðugt

**EUROSPORT**

- 2.00 Curling - Winter Olympic Games
- 3.30 Ice Hockey - Winter Olympic Games
- 5.00 Curling - Winter Olympic Games
- 6.00 Olympic Games - Olympic News
- 6.30 Olympic Games - Olympic Extra Large
- 7.00 Olympic Games - Olympic News
- 7.30 Olympic Games - Olympic Extra Large
- 8.00 Ice Hockey - Winter Olympic Games
- 9.30 Short Track Speed Skating - Winter Olympic Games
- 10.45 Alpine Skiing - Winter Olympic Games
- 11.30 Olympic Games - Olympic News
- 12.00 Biathlon - Winter Olympic Games
- 13.30 Speed Skating - Winter Olympic Games
- 14.30 Skeleton - Winter Olympic Games
- 15.15 Olympic Games - Olympic News
- 15.45 Olympic Games - Olympic Opening
- 16.00 Olympic Games - Slice
- 18.45 News - Eurosportnews Flash
- 19.00 Alpine Skiing - Winter Olympic Games
- 20.00 Curling - Winter Olympic Games
- 21.00 Nordic Combined Skiing - Winter Olympic Games
- 21.45 Cross-Country Skiing - Winter Olympic Games
- 22.45 News - Eurosportnews Report
- 23.00 Alpine Skiing - Winter Olympic Games
- 23.45 Ice Hockey - Winter Olympic Games
- 1.15 Curling - Winter Olympic Games
- 2.00 Close

**BBC PRIME**

- 0.00 TLZ: »Ape-Man – Adventures In Human Evolution – First-Born«
- 1.00 TLZ: »In the Blood – Original Sin«
- 2.00 TLZ: »Dramsci – Learning to Love the Grey«
- 2.30 TLZ: »Hollywood Science - Cool Hand Luke«
- 2.40 TLZ: »Mind Bites«
- 2.45 TLZ: »Forens – Lab Detectives«
- 3.00 TLZ: »Wild Moves«
- 3.30 TLZ: »Healing the Whole«
- 4.00 TLZ: »Trouble at the Top – Ratner Returns«
- 4.40 TLZ: »Science in Action – Forces«
- 5.00 TLZ: »France Inside Out – Paris«
- 5.30 TLZ: »The Ozmo English Show«
- 6.00 Bits & Bobs
- 6.15 The Shiny Show
- 6.35 Angelmouse
- 6.40 Playdays
- 7.00 Get Your Own Back
- 7.30 Ready Steady Cook
- 8.15 House Invaders
- 8.45 Bargain Hunt
- 9.15 Zoo Keepers
- 9.45 Vets in Practice: »Best Laid Plans«
- 10.15 The Weakest Link
- 11.00 Dr. Who: »Trial of a Timelord – Mindwarp«
- 11.30 Doctors
- 12.00 Eastenders
- 12.30 Hetty Wainthropp Investigates: »Mind Over Muscle«
- 13.30 Ready Steady Cook
- 14.15 Bits & Bobs
- 14.30 The Shiny Show
- 14.50 Angelmouse
- 14.55 Playdays
- 15.15 TOTP Eurochart
- 15.45 All Creatures Great & Small: »The Course of True Love«
- 16.45 The Naked Chef: »Going to the Dogs«
- 17.15 Gardeners' World 2001
- 17.45 The Weakest Link
- 18.30 Doctors
- 19.00 Eastenders
- 19.30 Vicar of Dibley: »Summer«
- 20.10 Dangerfield: »Hidden Desires«
- 21.00 The Young Ones: »Oil«
- 21.35 A History of Britain: »Empires«
- 22.35 The Big Trip
- 23.00 Casualty

**BBC WORLD**

- 0.00 BBC News – followed by Weather
- 0.30 Hardtalk (r)
- 1.00 BBC News – followed by Weather
- 1.30 Holiday (r)
- 2.00 BBC News – followed by Weather
- 2.30 Reporters (r)
- 3.00 BBC News – followed by Weather
- 3.30 Asia Today (r)
- 3.45 World Business Report (r)
- 4.00 BBC News – followed by Weather
- 4.30 Hardtalk
- 5.00 BBC News – followed by Weather
- 5.30 World Business Report
- 6.00 BBC News – followed by Weather
- 6.30 World Business Report
- 7.00 BBC News – followed by Weather
- 7.30 World Business Report
- 7.45 Sport Today
- 8.00 BBC News – followed by Weather
- 8.30 Holiday (r)
- 9.00 BBC News – followed by Weather
- 9.30 Australia Direct (r)
- 10.00 BBC News – followed by Weather
- 10.30 Asia Today
- 10.45 Sport Today
- 11.00 BBC News – followed by Weather
- 11.30 Hardtalk (r)
- 12.00 BBC News – followed by Weather
- 12.30 World Business Report
- 12.45 Sport Today
- 13.00 BBC News – followed by Weather
- 13.30 The Car's The Star (r)
- 14.00 BBC News – followed by Weather
- 14.30 Australia Direct (r)
- 15.00 BBC News – followed by Weather
- 15.30 Asia Today
- 16.00 BBC News
- 16.30 Hardtalk (r)
- 17.00 BBC News
- 17.15 World Business Report – followed by Weather
- 17.30 Talking Movies (r)
- 18.00 BBC News – followed by Weather
- 18.30 World Business Report
- 18.45 Sport Today
- 19.00 BBC News – followed by Weather
- 19.30 Hardtalk (r)
- 20.00 BBC News – followed by Weather
- 20.30 Click Online
- 21.00 BBC News – followed by Weather
- 21.30 World Business Report
- 22.00 BBC News – followed by Weather
- 22.30 Panorama
- 23.00 BBC News – followed by Weather
- 23.30 World Business Report (r)
- 23.45 Asia Today

**3 VIASAT**

- 5.30 Børne-hjørnet med Disney
- 7.00 TV-shop
- 8.00 Hvide løgne
- 8.25 Ricki Lake
- 9.15 Ricki Lake (G)
- 10.10 Horton-sagaen (G)
- 11.00 Horton-sagaen
- 11.50 Vild med dig
- 12.20 Pæn pige – sej sild
- 12.50 Melrose Place – Classic
- 13.45 Felicity
- 14.40 Baren 2002 (G)
- 15.10 Dawson Creek – Classic
- 16.05 Ricki Lake
- 17.00 Susan – sød og single
- 17.30 Sabrina – skolens heks
- 18.00 Alle elsker Raymond
- 18.30 Baren 2002
- 19.00 Skadestuen
- 20.00 Baren 2002 – direkte
- 21.00 Sex and the City
- 21.35 Strong Medicine
- 22.35 Baren 2002 (G)
- 23.05 Baren 2002 – direkte (G)
- 0.05 Vore værste år
- 0.35 Simpsons
- 1.05 Nash Bridges
- 2.05 Ricki Lake (G)
- 2.55 Drøm videre
- 3.20 Vore værste år (G)
- 3.45 Træneren
- 4.10 Sunset Beach
- 4.55 Godnat

**ÚF**

- 7.00 Tíðindi
- 7.05 Morgunlestur - Ebbe Rasmussen í Hesti lesur
- 7.15 Barnaløtan - Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
- 7.30 Tíðindi
- 7.35 Morgunrásin - Hilmar Jan Hansen og Bjarni Mohr leggja til rættis
- 8.00 Tíðindi
- 8.03 Morgunrásin
- 9.00 Tíðindi
- 9.03 Sjónarringurin (e) - Árni Joensen leggur til rættis
- 9.35 Dagsins tónar
- 9.50 Morgunlestur (e) - Ebbe Rasmussen í Hesti lesur
- 10.00 Tíðindi
- 10.03 Fimleikaløtan 3
- 10.10 Tit skriva, vit spæla - Øssur Egholm skipar fyri
- 11.00 Tíðindi
- 11.03 Á sanganna veingjum (e) - Gunnvør Poulsen leggur til rættis
- 11.35 Undir døgurða
- 12.00 Veðurtíðindi
- 12.02 Middagstónleikur
- 12.15 Skráin og lýsingar
- 12.20 Tíðindini
- 12.40 Døgurðatónar
- 13.00 Tónatímin
- 14.00 Fimmarin (e) - Sigmar Bláberg leggur til rættis
- 15.00 Tíðindi
- 15.03 Nýtt og gott gamalt - Femja Petersen velur løgini
- 16.00 Tíðindi
- 16.03 Bitar úr Billboard - Rúni Jákupsson stílar fyri
- 17.00 Tíðindi
- 17.05 Í víngarðinum - Alexander Samuelsen stílar fyri
- 18.00 Barnaløtan (e) - Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
- 18.25 Skráin og lýsingar
- 18.30 Tíðindini
- 19.00 Tilvera: Deyðssyndirnar - Armgarð Arge leggur til rættis
- 19.30 Crescendo - Kári Olsen stílar fyri
- 20.30 Bør Børson - Marius Johannesen lesur 15. part av framhaldssøgu eftir Johan Falkberget
- 21.00 Tíðindi
- 21.05 Dagsetur - Øssur Egholm leggur til rættis
- 22.00 Ljóðmúrurin - Regin Egholm skipar fyri
- 23.00 Tíðindi

**Rás 2**

- 9.45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
- 10.00 Leysaløtan (e) - Endursending frá í gjár - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis
- 11.00 Tónleikur
- 12.00 Tíðindi og kunngerðir
- 12.15 Tónleikur
- 13.00 Ynskiløtan - Heilsur frá lurtarum - Sunneva Petersen er vertur - Send heilsur um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990
- 14.00 Lýsingar
- 14.05 Ynskiløtan (framhald)
- 15.00 Tíðindi og kunngerðir
- 15.15 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis
- 16.00 Fótbóltsprát - John William Joensen leggur til rættis, sent verður úr Studio 7
- 17.00 Norðlýsið - Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík - John William og Oliver Joensen leggja til rættis
- 18.00 Tíðindi og kunngerðir
- 18.15 Tónleikur
- 19.00 Orð á leiðini (EvR) - Evni: Jesus og strongd (2. partur) - Jógvan Zachariassen leggur til rættis
- 19.40 Tónleikur
- 21.00 Tíðindi og kunngerðir
- 21.15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
- 21.30 Tónleikur
- 22.00 Girlzone - Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri - Telefon: 359993 Fax: 359990 E-mail: girlzone@ras2.fo
- 0.00 Liðugt

**Lindin**

- 13.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
- 13.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
- 13.15 Okkara dagliga breyð
- 13.30 Sjómanssendingin Vitin v/ M. C. Restorff (e)
- 14.30 Barnalindin endursending frá Sunnudegnum
- 15.00 Horizon Star v/ Stellu Zachariassen
- 16.00 Tónleikur
- 18.00 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti
- 19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending
- 20.00 Barnalindin endursending frá Sunnudegnum
- 20.30 Okkara dagliga breyð (e)
- 20.40 Møtilýsingar fyri møtir ið verða í vikuskiftinum
- 20.55 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
- 21.00 Bønarlinjan beinleiðis sending við gesti vertur er Jenis av Rana - Bønarevnir kunnu ringjast inn frá kl. 20.00 Tlf. 321377 og fax á nr. 321379
- 0.00 uml. Dagsins Orð eftir Svenning av Lofti, Okkara Dagliga Breyð, Blandaður tónleikur, o.a.
- 2:00 Ein forvitnislig ferð gjøgnum Bíbliuna (e)
- 3.00 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, Okkara Dagliga Breyð, o.a.
- 6.00 Vit gevast

## Lívið umborð 1:4

svf Hóskvøldið kl. 20.45

– Donsk stuttrøð

Vit fylgja manningini umborð á danska køliskipinum Ditlev lauritsen. Skipið siglir yviri í Kyrrahavinum og vit fara umborð í Peru og sigla til bananlandið Ecuador. Sendingarnar snúgva seg um gerandisdagin hjá sjómonnum, sum arbeiða langt burturi frá familju og heimlandi.

Lagt til rættis: Carsten Fischer.

## Krimitímin: Undir illgruna II 3:4

svf Hóskvøldið kl. 21.40

– Virðislønt ensk krimirøð

Málið um morðið á ta 17 ára gomlu Joanne tykist at nærkast eini loysn, tá tann illa sjúki David Harvey viðgongur at hann hevurt skyldina í, at hon doyði. Men Jane Tennison ivast í, um Harvey sigur sannleikan. Samstundis hevur starvsfelagin Bob Oswalde handtikið tann sálarliga veika Tony Allen. At Tony er svartur, fær ikki Oswalde at verða blíðari við hann – heldur hinvegin.

Leikarar: Helen Mirren, Colin Salmon og John Benfield.

Leikrit: Allan Cubbitt eftir søgu hjá Lynda La Plante.

Leikstjórn: John Strickland.

## Strong Medicine

Dr. Dana kemur í eina trongstøðu, tá ein gamal vinur setir seg í samband við hana í sambandi við eina ivasama kosmetiska viðgerð.



3 Hóskvøldið kl.21.35

## Morgunlestrar

ÚF **18.–23. februar**

***Ebbe Rasmussen í Hesti lesur***

**Sálmar og skriftstøð:**

**Mánadagin 18. februar:**
nr. 469 Vilt tú, sál mín hava ró
Zak. 4,10

**Týsdagin 19. februar:**
nr. 163 Tá Kristus, vár Guð
Jóhs. 8,29
nr. 63 Jesus besta navnið er

**Mikudagin 20. februar:**
nr. 497 Hjá tær, mín Jesus, har er trygt
Mika 7,8
nr. 548 Nú dagur steig

**Hósdagin 21. februar:**
nr. 166 Aftur føstuklokkan ljóðar
Jóhs. 18,1

**Fríggjadagin 22. februar:**
nr. 487 Mín Guð, eg vil ei víkja
Jer. 21,8

**Leygardagin 23. februar:**
nr. 430 Tit hús tykkum byggið
Sálm. 127,1
nr. 436 Guð, góði faðir, ver hjá teim



## UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:

### Danska skuldin veksur

Hóast danski tjóðbankin ikki hevur kunngjørt hagtølini fyri donsku uttanlandsskuldina seinasta ársskiftið, er tað greitt, at skuldin var størri fyri einum mánað síðani enn fyri einum ári síðani. Í landsins størsta banka, Danske Bank, siga tey, at uttanlandsskuldin vaks í fjør orsakað av kursbroytingum, sum ikki gagnaðu Danmark.

Við árslok í 2000 varð danska uttanlandsskuldin gjørd upp til 178 mia. krónur, og tað var 15 mia. krónur meiri enn við árslok árið fyri. Danmark hevur annars havt avlop á gjaldsjavnanum seinastu árini. Tjóðbankin hevur júst kunngjørt, at valopið í fjør var 33,7 mia. krónur, og tað er met.

### Slógvið skal nýtast

Tað eru ikki bert føroyingar, sum hava ætlanir um at fáa meiri burtur úr fiskahøvdum og -ryggjum.

Norðmenn gagnnýta árliga umleið 47.000 tons av fiskaslógvi, men onnur 145.000 tons verða koyrd í havið. Her er talan um høvd, ryggir, innvøl og rækjuskeljar. Í dag verða bert tíggju prosent av hesum nýtt til mannaføði. Hitt fer til djóraføði.

Her skal ein broyting koma í, og fleiri norskir lærustovnar innan fiskivinnuna arbeiða nú við ætlanum um, hvussu meiri kann fáast burtur úr hesum ráevninum. Samstundis verður arbeitt við einari norðurlendskari verkætlan á økinum.

### ABB hall

Stóra svenska fyritøkan ABB hevði fyri fyrstu ferð í 70 ára longu søgu felagsins hall av rakstr inum í fjør. Fyritøkan kunngjørdi í gjár, at hallið var seks mia. krónur. ABB hevur 160.000 fólk í arbeiði kring heimin, men nú skulu 12.000 sigast upp. 19.000 sviar arbeiða hjá ABB, og av teimum missa 700 arbeiðið.

# NATO átti at sitið á ákærubonkinum

**Slobodan Milosevic legði í gjár NATO undir at hava "framleitt ósannindi", sum skuldu rættvísgera álopið á land hansara.**

MILOSEVIC-MÁLIÐ

*Árni Joensen*

Í gjár var fekk Slobodan Milosevic høvi at verja seg ímóti ákærunum um krígsbrotsverk og brotsverk ímóti mannaættini. Hann gjørdi tó vart við, at talan var ikki um eina verju, tí hann góðtekur framvegis ikki krígsbrotsmannadómstólin í Haag. Tí fór ístaðin at halda røðu fyri rættinum, segði hann.

Milosevic legði fyri við at vísa rættinum ein tímaangan videofilm um krígg-ið í Kosovo í 1999. Upptøkan sáddi iva um eitt hópmorð í bygdini Racak í januar í 1999 og vildi ístaðin vera við, at talan var um eina søgu, sum Vesturheimurin pentaði saman, og sum skuldi greiða umheiminum frá, at serbar høvdu lagt eina ætlan um etniska útreinskan í Kosovo.

- Hesi ræðuligu ósannindi vórðu nýtt til at øsa fólk til at taka undir við at leypa á Jugoslavia, segði Milosevic.



*- NATO smíðaði ósannindi fyri at rættvísgera álopið á Jugoslavia, segðði Slobodan Milosevic, tá hann helt røðu fyri rættinum í Haag í gjár*

*Mynd: Reuters*

**Bumbaðu sivilfólk**

Milosevic vísti eisini rættinum myndir av kosovoalbanum, sum doyðu í einum NATO-bumbuálopi á mars í 1999. Sambært NATO vóru hetta fólk, sum flýddu undan serbiska herinum, men sannleikin er júst tann øvugti, segði Milosevic.

Hann greiddi frá, at kosovoalbanararnir, sum doyðu í álopinum, vóru flýdd undan bumbuálopunum hjá NATO-flogførunum og ikki undan serbiska herinum, sum NATO greiddi frá. Síðani vísti hann rættinum myndir av fólki, sum doyðu í hesum NATO-álopinum.

Milosevic gjørdi eisini nógv burtur úr at vísa á, at NATO ferð eftir ferð breyt altjóða reglur undir bumbuálopinum á Jugoslavia. M. a. vísti hann á, at NATO-flogførini bumbaðu sjúkrahús, skúlar og barnagarðar. Eisini nevndi hann, at NATO í tí eina førinum bumbaði eitt rumenskt bilafylgi hjá altjóða Reyða Krossi. Men sum so mangt annað varð hetta dult vestanfyri, segði Milosevic.

# Uganda fremur grov brot á mannarættindini

**Mannarættindafelagsskapurin Human Rights Watch leggur Uganda undir at fremja grov brot á mannarættindini í grannalandinum Kongo**

MANNARÆTTINDI

*Árni Joensen*

Atfinningarnar hjá altjóða felagsskapinum standa í einari frágreiðing, sum varð almannakunngjørd mikudagin.

Deildir hjá ugandiska stjórnarherinum hava hersett partar av Kongo síðani 1998, og ugandiski stjórnarherurin styðjar eisini tríggjar uppreistrarfelagsskapir í Kongo við vápnum og venjing.

Human Rights Watch skrivar í frágreiðingini, at bardagarnir í teimum landspørtunum, sum Uganda hevur eftirlit við, at hava kostað fleiri túsund mannalív tær seinastu vikurnar, og at minst 15.000 fólk eru rikin frá húsi og heimi. Felagsskapurin biður ST leggja trýst á ugandisku stjórnina fyri at steðga áganginum.

Samstundis leggur felagsskapurin stýrið hjá ugandiska forsetanum, Yoweri Musuveni, undir at hava høvuðsábyrgdina av harðskapinum har eysturi í Kongo. Mannarættindini verða traðkað undir fót hvønn einasta dag, sigur felagsskapurin og vil hava ST at sekta ugandisku stjórnina.

Alison De Forges í Human Rights Watch sigur, at Uganda hevur áhuga í tí nógva náttúruríkidøminum í Kongo so sum gulli og diamantum, men at landið ger einki fyri at verja tey, sum har búgva. Tvørturímóti líða tey nógv, sigur hon.

Sama dag sum Human Rights Watch kunngjørdi sína frágreiðing, var norski menningarmálaráðharrin, Hilda Frafjord Johnson, í Uganda, har hon hitti m. a. Musuveni forseta. Uganda er millum tey afrikansku londini, sum fáa stóran fíggjarligan stuðul úr Noregi.

Úr Norðurlondum:

### Størri hvalakvotu

Norska fiskimálaráðið hevur gjørt av at loyva hvalabátunum at skjóta 674 sildrekar í ár. Tað eru 125 fleiri enn í fjør.

Í hvalaveiðuvinnuni eru menn fegnir um avgerðina hjá myndugleikunum, tí tey bæði seinastu árini er stórhvalakvotan bara minkað. Í 1999 kundu hvalabátarnir skjóta 753 sildrekar og í fjør 549. Tí kemur ein hækking væl við nú.

Í fjør samtykti norska stjórnin at loyva útflutningi av stórhvalaúrdrátti, og tað var hendan avgerðin, sum fekk fiskimálaráðið at hækka sildrekakvotuna í ár.

### Kirkjan skal spara

Danski kirkjumálaráðharrin Tove Fergo hóttir nú við at taka neyðug stig, um meinigheitsráðini ikki vísa samfelagssinni, sum hon tekur til. Samstundis hevur hon gjørt greitt, at skattasteðgurin hjá stjórnini umfatar eisini kirkjuna. Akta ráðini ikki, kann henda, at kirkjan fær minni pengar í komandi árum.

Í einum brævi til tey næstan 2000 meinigheitsráðini skrivar ráðharrin, at skattasteðgurin umfatar eisini kirkjuskattin, sum í Danmark er 0,86 prosent í meðal. Ráðharrin sigur, at tað kann ikki vera rætt, at kirkjurnar gerast fínari og fínari, samstundis sum skúlar og sjúkrahús hava stóran tørv á viðlíkahaldi. Hon leggur afturat, at eftir hennara tykki ger tað einki, um tað sæst á kirkjunum, at tær verða nýttar.

Tove Fergo mælir samstundis meinigheitsráðunum til at fara betur um pengarnar, tá eitt nú prestagarðar skulu umvælast ella byggjast. Hon ivast ikki í, at her kundi nógv verið spart.

Danska fólkakirkjan fær árliga fimm mia. krónur. Av hesum koma umleið ein mia. krónur úr ríkiskassanum, meðan hitt kemur frá tí vanliga kirkjuskattinum í teimum einstøku kommununum.